# Johan er imponeraður av B36

**Takið hjá B36 venjaranum er at fáa sínar menn niður á jørðina og upp aftur at standa, tá ið teir á Skála í morgin skulu stríðast um oddasessin**

SKÁLA-B36
*Jóannes Hansen*



Tað verður ógvuliga spennandi á Skála í morgin. Heimaliðið og B36 eru oddalið, og tey eru væl fyri undan toppuppgerðini. B36 hevur alt fólkið tókt, og hjá Skála er tað miðvallarin í vinstru, Hanus Thorleifsson, sum er leikbannaður. Hann varð vístur av vøllinum í Gøtu síðsta sunnudag.

B36 ferðalagið skuldi koma í Vágar seinnapartin í gjár. Skipanin sigur, at dysturin móti Skála skuldi verða seinnapartin í dag, men eftir áheitan frá B36 er hann útsettur til í morgin. Tað er ikki meiri enn rímuligt, at felag, sum stendur seg væl í altjóða høpi, ikki verður óneyðugt sektað í heimligu kappingini.

Skála venjarin, Johan Nielsen, er royndasti venjarin í landinum. Hann hevur áður vant B36, og hann sigur seg vera ógvuliga imponeraðan av B36 avrikinum á flatlondum.

- Eg havi ikki sæð dystin. B36 megnaði javnleik í Vestmannaoyggjunum, men tá ið hugsað verður um mótstøðuliðið, so man hetta vera besta Europa Cup avrikið hjá nøkrum føroyskum liði. Við GÍ taptu vit við einum máli í Finnlandi. Úrslitið ta ferðina var 1-0. Men tað er stórur munur at tapa 1-0 og at tapa 2-1. Útivallarmálið er rættuliga týdningarmikið, og tað var flott av B36 at megna tað, sigur Johan Nielsen, sum samstundis staðfestir, at tað er eitt lið á aldukambinum og við sera góðari skipan og tryggari verju, sum teir í morgin skulu spæla móti:

- Tað sigur ikki so lítið, at FCM ikki megnaði at skora móti teimum í opnum spæli, men bara í sambandi við tvey hornaspørk!

Skálamenn eru væl fyrireikaðir, og teir rokna við tættari uppgerð í morgin. Tá ið oddaliðini fyrr í ár hittust á Skála var úrslitið 1-1. Í Gundadali var úrslitið 2-2, og tað kann gott vera, at javnleikur eisini í morgin er sannlíkt úrslit.

Takið hjá B36 venjaranum, Sigfríði Clementsen, og ikki minst fysiska venjaranum, Magna Mohr, eftir glæsiliga avrikið og úrslitið í Herning er at fáa spælararnar at fokusera á avbjóðingina á Skála og at gloyma alt um avrikið í Herning og avbjóðingina á Tórsvølli annan hósdag.

Allir B36 spælararnir eru tøkir. Ingi Højsted fór av vøllinum, tá ið tíðin var um at vera runnin í Herning, men honum bilti einki.

Fróði Benjaminsen og Bergur Midjord vóru leikbannaðir hóskvøldið. Eingin ivi er um, at teir báðir vera millum teir fyrstu ellivu á Skála. Harvið er sannlíkt, at Bárður H. Joensen verður á beinkinum. Tað kann ikki sigast annað enn at vera luksus trupulleiki í B36. Ungi maðurin, sum ikki hevur serligar royndir í bestu deildini, spældi sum ein brandur, tá ið hann ansaði Frank Kristiansen og David Nielsen, sum mugu roknast at vera uppaftur betri álopsspælarar, enn Jónhard Frederiksberg og Bogi Gregersen eru.

## Finala um niðurflytingina

**Heiðurskrýndu TB og KÍ fara í dag innanhýsis at gera av, hvat av hesum feløgunum skal vera besta boðið upp á beinleiðis niðurflytingarplássið**

TB-KÍ
*Jóannes Hansen*

Tað er einki sum eitur. Tann parturin, sum seinnapartin í dag fer við ongum av Sevmýri verður fremsta evnið til beinleiðis niðurflyting. Tá verður fjarstøðan fram til næstaftastu brík trý stig. Talan er sostatt um óvuliga týdningarmikla roynd hjá bæði TB og KÍ, sum fyrr í ár hava spælt tvær ferðir.

Tvørámenn hava undan síðsta triðinginum av kappingini styrkt seg við serbiskum álopsspælara. Hann var fyrstu ferð við móti ÍF. Talan er um 27 ára gamla Dejan Tonic, sum Milan Milanovic, TB venjarin, hevur verið venjari hjá í tveimum feløgum í bestu serbisku deildini.

Aca Petrovic, stinni miðverjin, var leikbannaður móti ÍF. Hann er tøkur aftur móti KÍ.

Kurt Mørkøre vandi hóskvøldið fyri fyrstu ferð í hesum umfarinum saman við liðfeløgunum í Klaksvík. Úr Klaksvík frættist, at hann var sær sjálvum líkum sum íblásari og málskjútti, og góðar keldur vilja vera við, at hann tóktist vera væl fyri.

Avbjóðingin á Tvøroyri verður tann fyrsta hjá KÍ, síðani at Atli Danielsen fór til Noregs. Tí er neyðugt at umskipa miðvøllin. Tað er eisini neyðugt at umskipa miðverjuna. Niclas Niclasen endaði eftir dystin í Runavík á Landssjúkrahúsinum. Har varð staðfest, at eitt bein í pannuni er brotið. Niclas er sjúkrameldaður, og hann verður ikki við KÍ nógvu tær næstu ferðirnar.

Takið hjá Oddbjørn Joensen er at skrúva liðið rætt saman. Tað er sannlíkt, at Ovi Nysted, sum seinast var á beinkinum, verður settur í miðverjuna. Hann var hálvskaddur fyri viku síðani.

TB og KÍ hava tikist tvær ferðir fyrr í ár. Á Sevmýri endaði tað málleyst í sjeynda umfarinum, ið var á skránni 8. mai. Í tíggjunda umfarinum 22. mai vann KÍ 6-1 á TB í Klaksvík. Síðani tá hevur tað ikki eydnast KÍ í átta dystum at fáa fult.

Síðsti TB sigurin var 16. mai, tá ið teir á heimavølli í 9. umfarinum vunnu 3-0 á GÍ.

## Opið bræv til Nes Sóknar Ítróttarfelag

Í grein í Dimmalætting tann 8. august 2005 er høvuðsvenjari tykkara siteraður fyri at siga:

"...at framherjin hjá NSÍ, Ikechukwu Onyema, hevur upplivað, og gjørdi tað aftur í dystinum móti KÍ, at føroyskir mótstøðuleikarar rópa ókvæmisorð eftir sær, tí hann hevur ein annan uppruna og húðalit enn føroysku leikararnir...."

Tað er ikki nakað nýtt at tað verður nógv sagt tá hart leikar á í einum fótbóltsdysti, men at venjari tykkara alment í fjølmiðlunum leggur KÍ leikarar undir at vera rasistar kann als ikki góðtakast.

Klaksvíkingar eru ikki rasistar og rasisma verður ikki told í Klaksvíkar Ítróttarfelag.

Klaksvíkar Ítróttarfelag metir útsøgnirnar og atburðin hjá høvuðsvenjaranum í NSÍ at vera somikið langt frá tí í vantast kann av manni í slíkum høgum ítróttar starvi at felagið krevur eina umbering.

Hinvegin hevði tað verið meiri passandi um venjari tygara kom við eini umbering fyri henda sama NSÍ leikara, sum sera óndsinnað skallaði KÍ verjuleikara í andlitið í dystinum.

Hendingin var somikið álvarslig at leikarin endaði á landssjúkrahúsinum og verður vantandi ikki tøkur aftur í ár.

KÍ leikarin, sum bleiv niðurskallaður av omanfyrinevnda NSÍ leikara, verður heldur ikki arbeiðsførur í rúma tíð, tá hann hevur brotið pannina.

Felagið hevur eisini sent avrit av brævinum til kappingarnevndina hjá FSF.

Vegna Klaksvíkar Ítróttarfelag
John William Joensen

# HB trívst væl í andglettinum

**Hjá NSÍ er takið at halda fram við góða rákinum á heimavølli og harvið at halda tørn um møguleikan at røkka heiðursmerkjum. Báðir partar eru plágaðir av leikbannum**

NSÍ-HB
*Jóannes Hansen*

HB trívst væl í andglettinum. Tað hava trífaldu meistararnir, sum eru eitt av trimum oddaliðum, ferð eftir ferð víst. Í Klaksvík vóru teir aftanfyri, tá ið tað restaði eitt korter, men teir vunnu. Móti B36 vóru teir góða løtu undirmannaðir, men teir megnaðu kortini javnleik.

- Vit kenna treytirnar, og tað plagar at roynast hampuliga væl í Runavík, staðfestir HB liðformaðurin, Rúni Nolsøe. Hann verður millum áskoðararnar í Runavík, har fyrsta brírksliðið verður klokkan 16 í dag. Merkisvert er tað, at finskur dómari skal halda skil á. Hetta er fyrsta royndin á føroyskari jørð eftir at dómara samstarvsavtala er gjørd millum norðurlendsku fótbóltstjóðirnar.

Rúni Nolsøe hevur fimm gul kort á kontini, og tað hevur miðverjin Rasmus Nolsøe eisini. Heine Fernandez er leikbannaður eftir reyða kortið móti B36. Tað ber við sær, at HB venjarin hvørki verður á vøllinum ella á beinkinum. Ásetingarnar siga, at leikbannaðir spælarar hava ikki loyvi at vera á beinkinum.

Jóhannis Joensen varð so mikið illa skaddur móti B36, at hann ikki hevur vant síðani, og hann verður ikki við móti NSÍ. Jóhannis og Rasmus Nolsøe hava mannað HB miðverjuna, sum harvið skal mannast av nýggjum.

Miðvallarin Kári Nielsen og Hans á Lag eru tøkir aftur, eftir at teir hava sitið leikbann av sær. Hans á Lag hevur áður verið miðverji. Higartil í ár hevur hann tó verið álopsspælari og toppskjútti, og so er spurningurin, hvat venjarin velur at gera. Aðrir álopsmøguleikar eru Bárður Mortansson og Hendrik Rubeksen. Svenn Dam Jacobsen hevur seinastu vikurnar aftur og aftur víst, at tað kann roknast við honum sum stuðulsspælara á miðvøllinum.

Trygvi Mortensen, NSÍ venjarin, hevur sagt, at tað vera ikki minst teir tríggir heimadystirnir, sum eru á skránni fyrstu umførini eftir summarsteðgin, ið fara at gera av, um NSÍ skal kappast um heiðurskrónur og altjóða atgongumerki, ella um NSÍ skal detta niður móti miðjuni.

Fyrsta royndin móti KÍ bar fulla úrtøku við sær. Tá ið tað restaðu fýra minuttir var Ike rikin av vøllinum. Sektina av tí kenna NSÍ og Ike móti HB. Sterki álopsspælarin er leikbannaður í dag. Málskjúttin móti KÍ, Páll M. Joensen, verður heldur ikki við. Tað verður sagt at vera partur av leiguavtaluni millum felagið hjá honum, HB, og NSÍ, sum hann hevur umboðað og skal umboða tað, ið er eftir av hesum kappingarárinum, at Páll ikki skal spæla móti HB.

HB og NSÍ hava fyrr í ár spælt tvær ferðir í Gundadali. Í øðrum umfari 3. apríl vann HB 2-1, og í tíggjunda umfarinum, sum var 22. mai, vann HB 3-1.